# Jastrid Enghamar

## til mammu á 75 ára degnum

Góða mamma, í dag 14. november 2006 kunnu vit seks systkini heiðra teg á 75-ára degnum, og tað eru vit bæði glað og stolt yvir, vælvitandi at lívsleið tín ikki altíð hevur verið eins bjørt.

Foreldur tíni vóru Bette Mortensen av Argjum og Johan Kjærbo úr Sumba, og vart tú yngst av trimum systrum. Tú var ikki fylt tvey ár, tá mamma tín doyði. Pápi tín var sjómaður, og búsettist tú tí á Argjum hjá familju, men fór seinni suður aftur at ganga í skúla og bleiv fermd í Vági.

Pápi tín giftist upp aftur, og í hesi giftu fær hann trý børn, sum tú hevur stak gott samband við, børnum tínum til stóra gleði. Seinni fert tú til Havnar at arbeiða, millum annað húspláss og á Landssjúkrahúsinum. Í Havnini hittir tú ein fuglfirðing, ið nevndist Jørgen, ið seinni gjørdist maður tín. Tíðirnar, mitt í fimmti árunum, vóru ikki eins góðar og ynskiligt og fluttu tit tískil til Fuglafjarðar, henda leið gekk seinni víðari til Klaksvíkar, fyri síðani at búsetast í Havn.

Tykkum eydnaðist at fáa seks børn á lívi, tríggjar dreingir og tríggjar gentur. Alt hetta gekk so mikið skjótt fyri seg, at tit enn ikki høvdu fingið sett føtur undir egið borð.

Eg minnist tá fyrst í sjeytiárunum, tá babba stoltur byrjaði at tosa um at keypa hús á Tórsbyrgi, og vóru tú og babba sera glað og spent til hetta, men so skuldi ikki verða. Babba var fyri tí lagnu, at gerast sjúkur og andaðist 23. desember 1974, bert 46 ára gamal. Ikki var lætt at sita einkja, einans 42 ára gomul og við seks børnum. Men góða mamma, sjálvt ikki hetta fekk fótafestið undan tær, men við sterkum sinni tók tú hond um tíni, fór út at arbeiða í køkinum á Landssjúkrahúsinum og síðani á Sjómansheiminum, har tú ognaði tær vinfólk fyri lívið.



*Jastrid og ommusonurin, Bergur*

Heimurin hevur fostrað manga megnar kvinnu, m.a. Margareth Thatcher, Golda Meir og Elisabeth I, men fyri tíni børn koma hesar tær ikki til kníggja.

Góða mamma, tú kann við gleði hyggja rundan um teg og síggja, at alt stríðið ikki var til fánýtis. Harrin signi teg.

**Við kvøðu**
**Elsti sonur tín**

---

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Ingrid Isholm** fer av Kapellinum á Landssjúkrahúsinum í kvøld klokkan 18.00, heim í Ebenezer. Jarðarferðin verður úr Ebenezer týsdagin 14. november klokkan 14.00

**Jóhanna Katrina Jacobsen vanliga nevnd Lillan**, andaðist á Norðoya Røktarheimi leygardagin 87 ára gomul. Kistan fer úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi mánakvøldið 13. nov. kl. 18.00. Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni týsdagin 14. nov. kl. 13.00

**Tórálvur Stenberg** fer til gravar úr Argja Kirkju mánadagin klokkan 13.00. Tey, ið ynskja at lata blómur ella krans, kunnu ístaðin lata Argja Bóltfelag eina gávu konta í peningastovnunum.

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at mamma okkara

**Ingrid Isholm**
fødd Guttesen

andaðist hósmorgunin 9. november 2006.

Jarðarferðin verður úr Ebenezer týsdagin 14. november kl. 14.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Jóhanna og Kristin**

---

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá kæri bróður okkara

**Meinhard Jacobsen**
Kollafirði

andaðist og varð jarðaður.
Takk fyri blómur og kransar, og takk til tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Bernhard, Hanni, Anna og Kada**

---

12. MAÐUR
FAROESE FOOTBALL SUPPORTERS

**Dagurin í morgin**

**14. november. Fríðrikur.** Hildið verður, at her verður sipað til ein biskup í Utrecht, sum varð myrdur av leigudrápsmonnum í 838. Keisarinnan Judita hevði sent teir, av tí at Fríðrikur hevði roynt at fáa keisaran til at skiljast frá henni. Navnið er tað upprunaliga gotiska Fripareikes, og merkir friður og harri. Johan Henrik Schrøter doyði hendan dagin í 1851.